# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



Tórshavnar alfrøði:

## Konfirmantar í Havn í 1925

Konfirmantarnir 19. apríl 1925. Hesir eru konfirmantarnir, sum blivu fermdir í Havnar kirkju 19. apríl 1925: Jacobine Olsen, Ása Isholm, Bergljót av Skarði, Else Johanne Rasmussen, Anna Frida Jacobsen, Sofie Henriette Davidsen, Frida Catherine Juliane Petersen, Petronella Malvine Egholm, Betzy Petra Malene Jacobsen, Elisabeth Sidana Johansen, Ólavur Hjalt, Osvald Henning Juul Hansen, Svend Zacharias Sofus Vilhelmsen, Carl Joen Pauli Poulsen, Olaf Johan Olsen, Napoleon Oliver Christiansen, Jóhannes av Skarði og Óla Kristian Skála, allir úr Havn. Simona Dorthea Kristina Simonsen (Norðradalur), Peter Hans Joensen (Nólsoy), Hans Viggo Sofus Djurhuus (Hvítanes), Johannes Christian Sofus Jacobsen (Nólsoy) og Joen Jacobsen (Nólsoy). Hettar er vistnokk einasta ferðin, at konfirmantar eru avmyndaðir úti í Tinganesi á trappuni inn í løgmanshúsini.

Enn einaferð ein mynd har øll ikki eru avmyndaði. 16 eru á myndini, meðan 23 blivu fermd. Genturnar vóru 11 og 10 eru avmyndaðar, og dreingir vóru 12 og bert 6 eru á myndini. Tann einasti vit kenna er drongurin nr. 4 frá vinstru, hann eitur Napoleon Oliver Christiansen (Pole í Mattalág).

Um tit vita nøvnini á hinum konfirmantunum, verða tit vinarliga biðin um at ringja til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647.

### Eigur nakar mynd av konfirmantum frá 1931?

Er tað nakar, sum kann hjálpa okkum við at finna mynd av konfirmantunum um heysti 1931?
Konfirmantarnir vóru: Byrge Poulsen, Poul Jacob Niels Poulsen, Ólavur Rasmussen, Andreas Hansen, Einar Mikkelsen, Niels Ole Mitens, Cornelius Christian Reinert, Anton Sofus Arge, Hans Johannes Clementsen, Hildibjartur Andreasen, Elsebeth Marie Sofie Rubeksen, Svanhild Andreasen, Sophie Helene Restorff, Dagmar Ludavika Sonja Hansen, Christiane Henriette Frida Mikkelsen, Sigrid Jacobsen, Olga Froda Rubeksen, Marie Rasmussen, Helene Christine Thomine Djurhuus, Helene Hansine Pouline Dam øll úr Havn, Poul Patursson (Kirkjubøur), Knud Monrad Laurits Vang (Kaldbak), Jenny Clementine Mortensen (Argir), Mortina Antonie Vesturheygg (Hvítanes), Mina Sunneva Atlanta Nybo (Hvítanes), Mathilda Danielsen (Nólsoy) og Anna Elisabeth Michelsen (Velbastaður). Um nakar liggur inni við, ella veit um onkran sum eigur myndina av konfirmantunum um heysti 1931, vinarliga ringið til Birgar Johannessen á tlf. 315747 ella 214647.

## Gunnar Nattestad tekur sæti á tingi

**Komandi tíggju dagarnar verður Gunnar K. Nattestad úr Sandavági tingmaður fyri Sambandsflokkin, meðan Marjus Dam er burturstaddur**



Gunnar K. Nattestad er 34 ára gamal og er útbúgvin cand merc. Hann hevur ikki havt sæti á tingi áður, tó at hann hevur verið politiskt virkin í mong ár. Eitt skifti var hann floksskrivari Sambandsfloksins.

Á valinum í 2004 fekk Gunnar K. Nattestad triðflestar atkvøður á lista Sambandsfloksins í Vágum.

## Tøkk

Hjartaliga verður takkað øllum fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæra fastir og mostir okkara

**Eva Margrethe Thomsen**
f. Samuelsen (í Horni), Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

Takk fyri blómur og kransar og fyri gávur til Ellisheimið, takk til Hera Joensen, prest fyri hansara vøkru orð, takk til sangarar, berarar og hjálparfólk í kirkjuni og takk tit mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Jacobina, Ásla og Elsa Birgitta**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri hjálp og samkenslu, tá okkara kæri pápi, verfaðir og abbi

**Egil Restorff**

doyði og varð jarðaður.

Ein serstøk tøkk til Sonju Klein prest, sangarar og berarar.

*Familjunnar vegna*

**Brynhild, Heini, Heidi, Barbara og Egil**

Sosialurin -har tað hendir